# Sølufólk til Klaksvíkar Sleipistøð

Á KSS hava vit úr at gera, og okkum tørvar sølufólk. Talan er um uppsøkjandi sølu á B2B-marknaðinum við sølu til skip og virkir.

Vit vænta av tær, at tú

- hevur royndir sum sølufólk,
- hevur árræði og ert ágrýtin,
- ert samstarvs- og framtakssinnað/ur og ikki bangin fyri at bretta uppum armar
- dugir at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum,

Afturfyri kunnu vit bjóða tær ein fjølbroyttan gerandisdag í einum umhvørvi, har nógv er at gera, og har ting til tíðir henda skjótt.

Starvið er fulla tíð, og løn og setanartreytir eru eftir avtalu. Starvsbyrjan verður skjótast gjørligt.

Ert tú sølufólkið, vit leita eftir, send eina umsókn til esther@kss.fo í seinasta lagi 17. januar 2021.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Esther Dahl, HR-leiðara, á telefon 232043 ella á esther@kss.fo

*KSS er ein nútímans fyritøka, har alt vanligt smiðju- og viðlíkahaldsarbeiði verður gjørt fyri bæði skip og virkir alt samdøgrið.*

*Við sínum uml. 75 starvsfólkum er KSS eitt av størstu arbeiðsplássunum í Norðoyggjum.*